J.nr.: 6642 K005

# Viðtøkur fyri Porkeris Bygdarsavn.

§1.

Porkeris Fornminnafelag setir á stovn sjálvognarstovnin Porkeris Bygdarsavn.

§2.

Endamál stovnsins er í Porkeris Kommunu:

at fremja varðveitingararbeiði Porkeris Fornminnafelags av fornminnum og forngripum.

at savna forngripir, merkja og skráseta teir við øllum upplýsingum, sum møguligt er at fáa til vega.

at seta upp siðsøguliga framsýning.

§ 3.

Savnið verður stýrt av nevnd Porkeris Fornminnafelags víðkað við einum limi, sum Porkeris Bygdarráð tilnevnir.

Stýrið stendur aðalfundi Porkeris Fornminnafelags til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

Stýrið skipar seg sjálvt. Samtyktir verða gjørdar við vanligum meiriluta. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi.

Stovnurin verður bundin við undirskrift av stýrisformanninum. Til sølu og veðsetan av fastari ogn krevst meirilutasamtykt, og undirskrift á viðkomandi skjøl av stýrisformanni og einum stýrislimi.

Roknskaparárið er álmanakkaárið.

§ 4.

Gevst savnið við virki sínum, verður farið fram eftir grein 3, 3. stk. í løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentanarligum virksemi.

- 6 FEB. 1997

Hesar viðtøkur eru samtyktar á eykaaðalfundi hjá Porkeris Fornminnafelag 9.december 1996.

Magnus Hansen — Mikkjal Sørensen

Heri Larsen — Torgin Stapni

Hanna Olsen

PORKERIS BYGDARRÁÐ

Góðkendar á fundi í Porkeris Bygdarráði 29. januar 1997.

3880 Porkeri

Anna Larsen Hans Eli Bech Sigmundur Olsen

Heri Danielsen Eli Frederiksen